VIÐMERKINGAR

# Inn við móður-mjólkini

**Annika Olsen**



Tað sigst, at Føroyar hava eitt tað reinasta havumhvørvið í heiminum, og er hetta nakað, sum vit føroyingar eru sera stoltir av. Men vit kenna eisini tann snýkjandi fíggindan, ið eitur dálking, og sum hóttir okkara vakra umhvørvi. Fyri at varðveita hetta reina havumhvørvið og eina reina náttúru eiga børn, longu frá barnsbeini av, at læra at hava ein positivan hugburð til eitt reint umhvørvi. Hetta eru fólk í Vestmanna byrjað at taka stig til, nevniliga at seta á stovn ein sokallaðan grønan barnagarð, ið leggur stóran dent á at venja børnini til at verja teirra umhvørvi. Eitt frálíkt tiltak, ið vónandi fær aðrar barnagarðar til at gera líknandi tiltøk.

Tað er neyðugt, at børnini fáa ein góðan og sunnan hugburð til umhvørvið inn við móðurmjólkini soleiðis at hesi, tá ið tey verða vaksin av sínum eintingum hugsa um umhvørvið. Tad vísir seg eisini, at børnini halda, at tað er spennandi og byrja at vera ágrýtin í arbeiðnum fyri at verja umhvørvið. Umframt at umhvørvið verður styrkt av hesum, eru vit eisini við til at geva børnum okkara nøkur dygdargóð virði.

# Ríkisfelagsskapurin heimsins besta skipan 5. partur

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Nú hevur undirritaði verið løgtingsmaður síðani valið síðst, leingist eftir nøkrum heilt grundleggjandi innan tinggátt, nakað sum eg upplivi í gerandisdegnum, uttan fyri tinggátt.

Eg leingist eftir dygdum innan tingátt sum kallast »eitt orð er eitt orð og ein maður ein maður«, hví kunnu tinglimir ikki í størri mun tosa um landsins besta, í staðin fyri altíð at hugsa taktikk og flokspolitiskan vinning.

Hvussu kunnu vit lyfta í felag innan tinggátt, tá vit ikki mentalt megna at gloyma klandur og stríð, hví søkja vit ikki tann besta persónliga felagsnevnarin hjá tinglimum, í staðin fyri tað, sum hevur verði seinastu árini, nemliga lægsta felagsnevnara.

Ríkisfelagsskapurin er ein skipan, sum vit eiga at verða góð við, og menna, til felags gagn fyri allar føroyingar, burturi sum heima, vit hava ábyrgdina av einum sterkum ríkisfelagsskapi.

Eg vil Sambandsflokksins og landsins vegna arbeiða fyri, at vit aftur innan tinggátt, koma at kenna tann gamla føroyingin aftur, sum eg leingist eftir.

Tað er at kenna hitan av orðatakinum »eitt orð er eitt orð og ein maður ein maður«, tástani kunnu tú og eg byggja land saman.

# Alivinnan skal hava betri møguleikar at klára seg sjálv

**Heðin Zachariasen**
*løgtingsmaður fyri fólkaflokkin*



Alivinnan í Føroyum er sum øllum kunnugt í stórum trupulleikum. Hetta eiga vit at taka í størsta álvara, fyri at henda vinna kann koma fyri seg aftur, ongantíð ov skjótt.

Alivinnan er eitt gott alternativ til okkara fiskivinnu og hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Vit hava nógv sera gott fólk, sum kennir hesa vinnu væl og sum hava vunnið sær stóran kunnleika á økinum ígjøgnum hesi árini, henda vinna hevur virkað her á landi.

Sum støðan er nú, tørvar alivinnuni nýggjan kapital og tað er ógvuliga avmarkað, hvussu nógv vit sjálvir eru førir fyri at seta afturat av pengum í alivinnuna. Tí eiga vit at loysa henda trupulleikan soleiðis, at meiri útlendskur kapitalur kann koma ínn í alivinnuna. Vit eiga at sleppa markinum á 33% av útlendskum kapitali og geva pláss fyri væl meira av útlendskum kapitali, hetta fyri at alivinnan kann fóta sær aftur og okkara fólk framhaldandi kann halda fram við teirra arbeiðsplássum.

Tá ið alt gongur væl, kann tað vera gott, at vit eiga meginpartin sjálvi, men kanska var betri, um vinningurin og harvið váðin var spjaddur út á fleiri partar. So hevði støðan, sum vit nú eru komin í, helst ikki rakt okkum so hart, sum nú.

Um vit eru bangnir fyri at útlendskur kapitalur kemur at steðga allari aling í Føroyum, fyri síðani at hava betri møguleikar eitt nú í Norra, so er góður møguleiki fyri at seta treytir við aliloyvinum. Tað kann gerast við at áleggja feløgunum framleiðsluskyldu her heima í Føroyum og um framleiðsluskyldan ikki verður hildin, fellur rætturin at virka í tí føroysku alivinnuni burtur hjá viðkomandi felag. Seta vit rímiligar treytir til teir, sum hava aliloyvir, verða eftir míni metan, áhugamálini hjá bæði føroyingum og teimum, sum koma at keypa seg inn í alivinnuna í Føroyum, vardur.

Ístaðin fyri at seta vinnuni forðingar í vegin, eiga vit í staðin at geva vinnuni henda møguleika, sum ger, at alivinnan aftur kann mennast í Føroyum okkum øllum til fyrimuns. Vinnan eigur og má fáa góðar og greiðar karmar at virka undir, so at alivinnan framvegis kann verða eitt mundandi íkast í føroyska búskapin.

Tí eigur løgtingið sum skjótast at viðgera støðuna í alivinnuni og skipa so fyri, at alivinnan í framtíðini fær góðar og rúmligar karmar at virka undir. Tað má ikki henda, at alivinnan snávar um tær forðingar, sum landsins myndugleikar við lóg hava sett alivinnuni.

Latið okkum finna skilagóðar loysnir, alivinnuni og okkum øllum at gagni.

# Fólkið fyrst!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Javnaðarflokkurin verður við til fullveldisupptakið!

Tann 1. juli 2002 boðaði fullveldissamgongan – tann seinna – frá, at hon fór at fremja ein politikk í Føroyum, sum skuldi geva sjálvstýri, sosiala trygd, framburð. Umleið 18 mánaðir seinni eru somu flokkar rýmdir úr starvi í ótíð. Upptakið eftir hesa samgongu verður stórt og krevjandi.

Ein skrædnað klandurssamgonga er farin til hús, løgtingið sent heim og val útskrivað í ótíð – ella vit skulu velja um aftur og betur. Tað átti ikki at verið torført hjá Føroya fólki at valt betur eftir 18 mánað tómgongd og afturgongd. Tvørturímóti!

Meira sjálvstýri fingu vit ikki. Fullveldisflokkarnir eru nú vendir aftur til gomlu Heimastýrislógina.

Sosiala trygd fingu vit ikki. Eingin pensiónsreformur. Tann í keypikraft støðugt minkandi fólkapensiónin er enn álitið hjá mongum húsarhaldum her á landi – og tað er stór skomm, eftir sjey búskaparliga feit ár.

Tey sjúku skulu nú stilla upp á røð fyri at koma til viðgerðar, at bíða til peningur er tøkur – slíkt er óverdugt.

Og hvar í Føroyum er framburður at hóma ídag? Útoyggjapolitikkur og økismenningarpolitikkur eru higartil bert vorðin tóm orð.

Enntá hava umboð fyri Tjóðveldisflokkin boðað frá, at tey vilja avtaka flutningsstuðulin til fiskavørur. Hesin stuðul, sum er ein avgerandi treyt fyri at hava fiskavinnuna gangandi úti í økjunum. Bæði ráfiskauppboðssølan og útflutningsskipini liggja í miðøkinum, so kostnaðarmikil flutningur er neyðugur, við hvørt báðar vegir.

Hvussu skulu virkir í Sandoy, Suðuroy ella Norðoyggjum klára seg uttan ein stuðul til allan hendan flutning. Nei, hesin er neyðugur.

Og Strandferðslan og Bygdaleiðir eru niðurpínd, hóast hesi eru einasta samband við miðøkið, har tað ikki er landfast. Nei, hesin politikkurin hjá fullveldissamgonguni gevur onga økismenning, tvørturímóti.

Okkum tørvar nýggjan politikk, nýggja samgongu. Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram við einum politikki, sum setir fólkið fremst. Vit vilja loysa teir dagligu trupulleikarnar hjá fólki okkara fyrst. Hartil biða vit um stuðul.

# Stutt og greitt

**Bill Justinussen**
*Bill.teletech.fo*



Miðflokkurin tók undir við skattalætta á kr. 127 mill. fyri 2003 og 2004. Tað besta fyri borgaran er, at hann í størri mun sjálvur sleppur at avgera, hvat hann skal nýta sín pening til. Skattalætti er eisini góður familjupolitikkur, tí meiri verður at ráða yvir í einstaka húsarhaldinum. Har tvær inntøkur eru, gevur hesin skattalættin í rundum tølum eina meiri upphædd at ráða yvir á kr. 10.000 fyri einstaka húsarhaldið.

Hinvegin mugu almennu tilboðini til tey, sum eru verri fyri í samfelagnum, ikki versna orsakað av, at skattalætti verður veittur, og tað hava vit megnað at hildið fast um. Játtanin til heilsuverkið hækkar komandi ár sambært fíggjarlógaruppskotinum, og er hetta ein greið ábending um, at hetta hevur høga politiska raðfesting.

Gev Miðflokkinum framvegis ávirkan, so veitst tú, hvat tú fært.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Hjørdis Mortensen 60 ár



Leygardagin 20. desember verður Hjørdis Egholm Mortensen í Havn 60 ár.

Hjørdis er yngst av seks systkjum og vóru foreldur teirra Erika og Alfred (Affe) Egholm.

Aftaná lokna skúlagongd í fólkaskúlanum fór Hjørdis í studentaskúla, og var flokkur hennara tann seinasti, ið tók studentsprógv á VBV í Skansabrekkuni, áðrenn studentskúlin flutti niðan í Hoydalar.

Ikki meira enn liðug við skúlagongdina fekk hon 9. juli 1962 starv sum stjóra- og stjórnarskrivari á Tryggingarsambandinum Føroyar, og hevur hon sostatt arbeitt í somu fyritøku í 41 ár. Hóast hetta fyri nøkur kann tykjast at ganga beint móti tíðarinnar anda - ella "trend", sum tað verður nevnt í dag - so er einki løgið, at Hjørdis hevur gjørt av at gera fyrsta starv sítt til lívsstarv burturav. Tí er tað nakað, ið sermerkir Hjørdis, so er tað trúfesti hennara - bæði móti arbeiðsplássi, starvsfeløgum, vinum og ikki minst familju síni.

Altíð fryntilig og fyrikomandi hevur hon gjøgnum árini verið skrivari hjá fýra stjórum. Fyrst Tummasi Thomasen, síðani Marius Thomasen, Jens Peturi Arge og nú Gunnari í Liða. Hon hevur uppliva stóru broytingarnar, ið hendar eru innan tryggingarheimin og hevur dugað at laga seg eftir teimum, soleiðis at hon alla tíðina hevur verið før fyri at røkja starv sítt til lítar.

Men tað er ikki bert á "Tryggingini" at Hjørdis hevur gjørt vart við seg. Hon hevur verið og er framvegis aktiv á mongum økjum. Eitt nú hevur hon frá barnsbeini havt serligan tokka til fimleikin og hevur hon verið aktiv í Havnar Fimleikarfelag. Hon hevur luttikið í kappingunum um føroyameistaraheitið og var eisini á landsliðnum í fimleiki í 1970.

Hjørdis er gift við Heðin Mortensen, løgtingsmanni og ÍSF-forseta, so ikki er løgið at Hjørdis hevur havt nógv við ítrótt at gera. Trúliga røkir hon størvini og umboðanina, ið fylgja við, og hevur hon millum annað verið við á øllum Oyggjaleikum síðani 1989 sum partur av liðnum hjá Ítróttasambandinum.

Eitt orðatak sigur (hóast onkur heldur hetta vera sjavinistiskt) at aftan fyri ein hvønn mann stendur ein kvinna - og styðjar og stuðlar. Og hjá Hjørdis og Heðini er eingin ivi um hetta. Hjørdis hevur verið trúgvasti stuðul, leiðbeinari og revsari hjá Heðini í mongu álitsstørvum hansara. Hevur hjálpt og luttikið aktivt í nógva arbeiðinum og eigur sína stóra lut í, at skundmikil maður sum Heðin, ið altíð hevur úr at gera, kann náa alt arbeiðið. Hóast nógv er at taka sær av í samband við nógva arbeiðið, ið liggur á hjá einum húski, sum tí hjá Hjørdis og Heðin, so megnar Hjørdis við góðu organisatorisku og fyriskipanarligu evnum sínum at fáa alt at glíða sum tað skal. Hóast trýstið kann tykjast øðrum stórt, so fær hon á sín egna stillføra hátt alt at hanga saman. Og tá úrslitið skal fyriliggja, so ger tað tað eisini.

Hjørdis og Heðin eiga fýra børn. Av teimum býr bara elsta dótturin, Elin, í Føroyum, meðan hini trý - Ann, Guðrun og Eirikkur - eru búsitandi í Danmark í løtuni. Átta ommubørn hevur Hjørdis fingið og eru hon og Heðin (sum ommur og abbar mangan) "púra býtt" av teimum. Men tað er heldur eingin ivi um, at børnini í teimum báðum hava fingið góða ommu og góðan abba.

Føði- og dópsbrævið sigur tað, men ilt er at trúgva tí!! Men satt er tað - Hjørdis fer um tey seksti. Spelkin, sum ung kvinna á at líta, sjarmerandi og fitt, fyrikomandi og fryntilig, fitt og vøkur. Jú "superlativini" eru nógv, tá ein skal siga nakað um hana - og tey eiga heldur ikki at verða spard!!!

Sjálvan føðingardagin hava vinfólk, kenningar og familja møguleika at heilsa uppá Hjørdis, tí leygardagin verður "opið hús" í Sjónleikarhúsinum millum kl 11:00 og 15:00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Góða Hjørdis - lat okkum á henda hátt nýta høvi at ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum í vónini um trygga og góða framtíð.

**Vinfólk**

## Dagurin

**19. desember. Nemesius**, deyður umleið ár 250. Um halga mannin Nemesius sigur halgisøgan, at hann einaferð varð lagdur undir stuldur. Men tá ið hann kundi prógva, at hann var ósekur, varð hann ákærdur fyri at vera kristin og tikin av døgum.






Sølu- og marknaðarstjóri til Smyril Line

Smyril Line hevur avgjørt at savna alt ferðafólkavirksemið í eina sølu- og marknaðar-deild og søkir tí eftir einum dugnaligum sølu- og marknaðarstjóra at standa fyri framhaldandi menningini av virkseminum.

Tað liggur ein stór leiðsluuppgáva í at sameina, leiða og menna tey meira enn 40 starvsfólkini, sum nú skulu savnast í eina sølu- og marknaðardeild.

**Ábyrgdarøkini og arbeiðsuppgávurnar hjá sølu- og marknaðarstjóranum verða:**

- Fáa sum mest burtur úr sølu- og marknaðarvirkseminum - innanhýsis og uttanhýsis
- Áhaldandi meta um marknaðarvirksemið og úrslitið av hesum
- Skipa kundabólkar og menna tænastur
- Gera greiningar og uppskot um nýtt virksemi
- Skipa fyri tænastumenning
- Evna til, leggja fram og seta í verk sølu- og marknaðarætlanir
- Leiða og eftirmeta marknaðarvirksemið hjá deildunum uttanlands
- Stuðla aðalsøluumboðunum og samráðast við tey um virksemi
- Eftirmeta sølu- og marknaðarvirksemið hjá aðalsøluumboðunum
- Læra upp og menna sølufólkini á deildunum og hjá aðalsøluumboðunum
- Leggja fíggjarætlanir og eftirmeta sølumálini

*Roknast skal við nógvari ferðing í starvinum.*

**FØRLEIKAKRØV**

Til tess at kunna røkja starvið hevur sølu- og marknaðarstjórin helst eina sølubúskaparliga útbúgving sum t.d. cand.merc. ella HD í sølu. Harumframt eigur hann at hava drúgvar leiðsluroyndir - helst í altjóða høpi - frá eini sølu- og marknaðardeild.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur kunnleika um ferðavinnu.

Tað hevur týdning, at tann, ið settur verður, er vanur at arbeiða við søluumboðum og hevur góðan kunnleika at leiða dótturfeløg ella deildir - serliga í samband við broytingar-tilgongdir.

Starvið hevur sostatt í sær bæði leiðslu, sølu og marknaðarføring. Umsøkjarar við hollum royndum innan leiðslu í sølu verða tó tiknir framum.

Sølu- og marknaðarstjórin skal vera fyrikomandi og vera vanur at tosa við fólk á øllum stigum í samfelagnum. Tað hevur týdning at hava royndir í at leggja fram nýtt virksemi og nýggjar vørur og á tann hátt vera førur fyri at skapa motivatión og eldhug hjá starvsfólkum og samstarvsfeløgum.

Tað skal vera ein natúrligur eginleiki hjá umsøkjaranum at vera stigtakari og koma við uppskotum um nýtt virksemi, eins og hann skal duga at rekka settum málum og úrslitum. Eftirmeting av marknaðarætlanum, virksemi og fíggjarætlanum skal vera eitt vælkent amboð í hondunum á nýggja sølu- og marknaðarstjóranum.

Umsøkjarin skal duga enskt á høgum stigi bæði í skrift og talu.

Sølu- og marknaðarstjórin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran Óla Hammer, og hann møtir á nevndarfundum, tá spurningar viðvíkjandi sølu og marknaðarføring verða viðgjørdir.

**SMYRIL LINE BJÓÐAR**

Komandi sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line verður settur í eitt nýstovnað starv, sum hann sjálvur fær stóra ávirkan á. Talan er um eitt ógvuliga sjálvstøðugt starv við stórum frælsi.

Smyril Line er ein framsøkin og framtakssom fyritøka við einum høgum virkisstigi. Samverulagið í felagnum er óformligt, og starvsfólkini eru eyðkend fyri sín stóra egináhuga í arbeiðinum.

Rætti umsøkjarin fær góða løn og eftirløn.

**UMSÓKNIR**

Smyril Line hevur biðið headhunterfyri-tøkuna, SAM International A/S, leita eftir nýggja sølu- og marknaðarstjóranum. Tí skulu allir fyrispurningar, umsóknir og CV stílast til:

**Headhunter Stig Kromann - Andersen**
Skovdalen 7
3500 Værløse
Danmark
Telefon: 0045 44 44 03 32
Teldubústaður: ska@sam-int.com

Seinasta freist at søkja starvið er 8. januar 2004. Allar umsóknir og fyrispurningar verða viðgjørd í trúnaði.

SMYRIL LINE
Smyril Line
Postsmoga 370
110 Tórshavn